**Umsókn um barsilspening**
Løntakari

Vegleiðing til hvønn einstakan teig er aftast í umsóknini saman við treytunum fyri at fáa barsilspening.
Vilja bæði foreldur hava barsilspening, skulu tey senda inn hvør sína umsókn.
Freistin at søkja er 1 ár eftir barnsburð/ættleiðing.
Vinarliga skriva við spjaldrastavum.

## 1. Løntakari

| | |
|---|---|
| Navn: | P-tal: |
| Gøta og gøtunummar: | Postboks: |
| Postnummar og bygd/býur | Telefon: |
| Teldupostadressa: | Fartelefon: |
| Ert tú einlig/-ur við barninum/børnunum? | ☐ Ja ☐ Nei |
| Um ja, og tú hevur fleirburðar ella ættleiðir fleiri børn í senn, ber til at lata 48 vikur til ein umsorganarpersón. Upplýs tá navn og p-tal á umsorganarpersóni niðanfyri: | |
| Navn á umsorganarpersóni: | P-tal: |

## 2. Barsilstíðin

| Frá (dg. mð. ár) | Til og við (dg. mð. ár) |
|---|---|
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |

☐ 48 vikur eftir føðing
☐ 52 vikur eftir føðing (einlig/ur)
☐ 56 vikur eftir móttøku (ættleiðing)
☐ 56 vikur eftir móttøku (fyribils staðseting)

☐ + 4 vikur: Fleirburðar
☐ + 8 vikur: Barnsburður áðrenn 32. viku
☐ Longd barsilstíð vegna innlegging (sí vegl.)
☐ Longd barsilstíð vegna ov tíðliga fødd børn (Sí vegleiðing, punkt 2.)

## Umsókn um barsilspening
Løntakari

TAKS

### 3. Arbeiðsmarknaðarviðurskifti

Hevur tú sambært lóg og sáttmála rætt til løn frá arbeiðsgevara í barsilstíðini? ☐ Ja ☐ Nei

**Um ja**, so skal "Umsókn um barsilspening, arbeiðsgevari" eisini sendast .

Hevur tú verið á arbeiðsmarknaðinum styttri enn eitt ár áðrenn barsilstíðina? ☐ Ja ☐ Nei

**Um ja**:
Nær byrjaði tú at arbeiða? *(dg. mð. ár)*: ______________________________

Hevur tú rætt til barsilspening úr øðrum landi? ☐ Ja ☐ Nei

Hevur tú tilknýti til fleiri arbeiðsgevarar í barsilstíðini? ☐ Ja ☐ Nei

**Um ja**:
Hvørjar? ______________________________

(Hevur tú fleiri arbeiðsgevarar, send so eina umsókn fyri hvønn arbeiðsgevara. Er talan um nevndararbeiði o.tíl., er ikki neyðugt við umsókn, men bert frágreiðing um hetta í teigi 6.)

Ert tú partvíst í arbeiði í barsilstíðini? ☐ Ja ☐ Nei

**Um ja**:
Navn á arbeiðsgevara: ______________________________

V-tal: ______________ % av fullari tíð: ______________

Tíðarskeið: frá ______________ til og við ______________

Bert galdandi fyri tey, ið eru liðug við útbúgving og byrjað barsilsfarloyvi eftir 1. juli 2024.

Ert tú nýútbúgvin? ☐ Ja ☐ Nei

Um ja, skalt tú senda inn saman við umsóknini váttan frá lærustovni.

### 4. Váttan frá arbeiðsgevara
*(Frágreiðing skal í teig 6, um hesin teigur ikki er útfyltur)*

Navn á arbeiðsgevara? ______________________________

V-tal: ______________

Eg vátti, at upplýsingarnar í teigunum 2 og 3 eru sannar.

--------------------------------- Dagfesting

--------------------------------- Undirskrift

# Umsókn um barsilspening
Løntakari

## 5. Váttan frá mammu
*(Verður bert útfylt, um umsøkjarin er pápi ella sammóðir at barninum)*

Eg vátti, at umsøkjarin er pápi ella sammóðir at barninum.

P-tal

Navn

Dagfesting

Undirskrift

Um pápin ella sammóðirin søkja um barsilspening í meira enn 4 vikur og um barsilspening eftir 14. viku eftir barnsburð, vátti eg, at eg ikki eri heima við løn í hesum tíðarskeiði.

Dagfesting

Undirskrift

## 6. Viðmerkingar

## 7. Váttan frá umsøkjara

Eg vátti, at givnu upplýsingar eru sannar, og eg bindi meg til at geva Barsilsskipanini boð um allar broytingar, ið kunnu hava týdning fyri barsilsfarloyvið. Somuleiðis vátti eg, at eg eri um barnið í barsilstíðini.

Dagfesting

Undirskrift

## Umsókn um barsilspening
Løntakari

# Høvuðstreytirnar fyri at fáa barsilspening

### Fyri at fáa rætt til barsilspening skalt tú:

1. vera kvinna, sum fer frá arbeiði orsakað av viðgongu ella barnsburði,
2. vera pápi ella sammóðir at nýføddum barni,
3. vera foreldur, sum fer frá arbeiði fyri at vera heima hjá ættleiddum barni,
4. vera um barnið í barsilstíðini,
5. hava fastan bústað í Føroyum,
6. hava fulla skattskyldu í Føroyum,
7. hava A-inntøku og/ella B-inntøku, ið trygging er teknað fyri, soleiðis at barsilspeningur kann roknast.

### Innlatingarfreist

Umsókn um barsilspening skal latast Barsilsskipanini innan 1 ár eftir barnsburð ella móttøkudag, um talan er um ættleiðing. Er umsóknin ikki innlatin áðrenn hesa freist, fellur rætturin til barsilspening burtur.

### Skjøl at lata inn saman við umsóknini

- Søkir tú um barsilspening í upp til 4 vikur áðrenn barnsburð, skalt tú lata inn bræv um skurðviðgerð (keisaraskurð) ella skjalprógv fyri mettan føðidag, ið ljósmóðir, lækni ella tílíkur persónur hevur váttað.
- Søkir tú um barsilspening í upp til 8 vikur áðrenn barnsburð, skalt tú lata inn læknaváttanina "váttan um sjúku hjá barnakonum ella vanda fyri fosturskaða".
- Fært tú dagpening upp til 8 vikur áðrenn mettan føðidag, skalt tú lata inn avrit av brævinum frá Almannaverkinum um hetta.
- Søkir tú um barsilspening eftir barnsburð, skalt tú lata inn "fráboðan um barnsburð".
- Søkir tú um barsilspening í sambandi við ættleiðing, skalt tú lata inn ættleiðingarloyvi og fráboðan um, nær farið varð eftir barninum.
- Søkir tú um barsilspening sum løntakari við b-inntøku, skalt tú lata inn avrit av lønarseðlum fyri b-inntøkuna seinastu 12 mánaðirnar, áðrenn barsilstíðin byrjar.
- Søkir tú um barsilspening sum nýútbúgvin, skalt tú lata inn váttan frá lærustovni.

Inntøka, sum er vunnin í Føroyum seinastu 12 mánaðirnar áðrenn barsilstíðina, skal ikki skjalprógvast. Barsilsskipanin fær hesar upplýsingar frá TAKS. Hetta er eisini galdandi fyri sjálvstøðugt vinnurekandi.

Frá 1. mai 2025 verður hámarkið fyri barsilspening verður javnað 1. januar á hvørjum árið eftir reglunum í løgtingslóg um javningarprocent til almannaveitingar.Fyri 2025 verður javnað við 3,6%.

### Útgjaldsupphæddir

Frá 1. mai 2025 til og við 31. desember kann barsilspeningurin í mesta lagi verða 31.080 kr. hvønn mánað.
Frá 1. juli 2024 til og við 30. apríl 2025 kann barsilspeningurin í mesta lagi verða 30.000 kr. hvønn mánað.
Til og við 30. juni 2024 kann barsilspeningurin í mesta lagi verða 25.000 kr. hvønn mánað.

Bundið eftirlønargjald verður lagt aftur at barsilspeninginum.

### Lógargrundarlag

Løgtingslóg um barsilsskipan frá 3. apríl 2001 við seinni broytingum.
Kunngerð um umsiting av barsilsskipan frá 31. mai 2001.

## Umsókn um barsilspening
Løntakari

## Vegleiðing til hvønn einstakan teig

### 1. Løntakari
Her skulu ásetast upplýsingar um umsøkjaran, m.a. navn, p-tal. Somuleiðis skal upplýsast, um umsøkjarin er einligur við barninum.

Á Borgaraglugganum ber til at síggja og broyta kontunummarið, har barsilspeningurin verður útgoldin á.

### 2. Barsilstíðin
Skriva fyrsta og síðsta barsilsdag. Um søkt verður um barsilspening fyri upp til 48 vikur eftir barnsburð ella 52 vikur eftir ættleiðing, er nóg mikið at seta byrjanardagfesting og kross í kassan við vikutalið. Fáa foreldur tvey børn ella fleiri, verða 4 vikur lagdar afturat (+ 4 vikur: Fleirburar). Verður átt áðrenn 37. viku, verða 8 vikur lagdar afturat (+ 8 vikur: Barnsburður áðrenn 32. viku).

Verður barsilstíðin býtt upp, skulu tíðarskeiðini skrivast á hvør sína reglu. Tíðarskeið kann ikki vera styttri enn eina viku. Ein vika er sjey fylgjandi dagar.

Mamman hevur rætt til barsilspening í 4 vikur áðrenn mettan barnsburð og upp til 8 vikur áðrenn, um hon við "Váttan um sjúku hjá barnakonu ella vanda fyri fosturskaða" prógvar, at tað fyri fostur og/ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera til arbeiðis.

Eftir barnsburð hava foreldur lógartryggjaðan rætt til at vera heima hjá barninum í til samans 52 vikur. Tey hava rætt til barsilspening í 52 av hesum vikum. Harav eru fyrstu 14 vikurnar til mammuna, 4 til pápan ella sammóðurina, og 34 eru til býtis.

Pápin ella sammóðirin kunnu nýta sínar 4 vikur samstundis, sum mamman nýtir sínar, og skal hava nýtt tær innan 52 vikur. Vikurnar, sum eru til býtis, kunnu einans nýtast av einum foreldri í senn. Tær kunnu í fyrsta lagi nýtast aftan á viku 14 eftir barnsburð, og tær skulu vera nýttar innan 52 vikur.

**Einsamøll/mallur við barninium/børninum**
Einlig hava rætt til allar 52 vikurnar innan tær fyrstu 52 vikurnar eftir barnsburð.
*Galdand fyri foreldur, ið fáa børn eftr 1. mai 2025:* Um mamman eigur fleirburar ella ættleiðir tvey ella fleiri børn í senn, kanst hon lata einum umsorganarpersóni tær 48 vikurnar pápin ella sammóðirin annars høvdu fingið. Upplýs navn og p-tal á umsorganarpersóni undir parti 1.

**Fleirburðar**
Foreldur, ið fáa fleirburar, fáa 4 vikur aftur at samlaðu barsilstíðini.
*Galdand fyri foreldur, ið fáa børn eftr 1. mai 2025:* Faðirin ella sammóðirin hevur rætt til barsilsfarloyvi í 48 vikur afturat teimum 4 vikunum. Tær 48 vikurnar kunnu nýtast, samstundis sum mamman er í barsilsfarloyvi og skulu verða nýttar innan 52 vikur eftir barnsburð. Um tú ert einsamøll við børnunum, kanst tú lata einum umsorganarpersóni tær 48 vikurnar. Upplýs navn og p-tal á umsorganarpersóni undir parti 1.

**Ov tíðliga fødd og innleggingar**
Foreldur, ið fáa barn áðrenn 32. viku í viðgongutíðini, fáa 8 vikur aftur at samlaðu barsilstíðini.
*Galdand fyri foreldur, ið fáa børn eftr 1. mai 2025:* Verða barn ella børn fødd áðrenn viku 37 í viðgonguni, verða tær vikur, sum eru millum barnsburðardagin og terminsdagin í viðgonguni eftir umsókn lagdar afturat teimum 34 vikunum, foreldur kunnu býta sínámillum. Set tá kross út fyri "Longd barsilstíð vegna ov tíðliga fødd børn"

Foreldur, ið ættleiða, hava rætt til barsilspening í til samans 52 vikur innan tær fyrstu 56 vikurnar eftir móttøku av barninum. Harafturat hava bæði foreldur rætt til barsilspening í upp til 4 vikur áðrenn móttøku av barninum. Treytin er, at tey eru uttanlands eftir barninum hetta tíðarskeið.

Í summum sáttmálum á arbeiðsmarknaðinum hava løntakarar rætt til løn frá arbeiðsgevara ein part ella alla barsilstíðina. Um løntakarin hevur rætt til løn ein part av barsilstíðini, er frá-dagurin dagin eftir síðsta lønardag.

**Umsókn um barsilspening**
Løntakari

TAKS

### 3. Arbeiðsmarknaðarviðurskifti

Upplýs, um umsøkjarin hevur rætt til barsilspening ella til løn frá arbeiðsgevara, um hann hevur verið á arbeiðsmarknaðinum minni enn eitt ár, hevur tilknýti til fleiri arbeiðsgevarar, og um hann er partvíst í arbeiði í barsilstíðini. Umsøkjari, ið hevur verið á arbeiðsmarknaðinum minni enn eitt ár, er at meta sum nýsettur, og barsilspeningurin verður tá roknaður frá hesum tíðarskeiði.

Nýsettur er eisini tann umsøkjari, ið seinastu 12 mánaðirnar er:

- liðugur við skúla og er byrjaður at arbeiða,
- liðugur við skúla og er farin í ALS (at vera í ALS er at meta sum at vera á arbeiðsmarknaðinum),
- á arbeiðsmarknaðinum fyrstu ferð.

Upplýs eisini um møguligan rætt til barsilspening úr øðrum landi. Løntakarar hava ikki rætt til at fáa barsilspening ella annan tílíkan stuðul í Føroyum og øðrum landi samstundis.

Løntakarin kann røkja starv niðursetta tíð, t.d. ein part av barsilstíðini, um hann vil tað. Arbeiðir hann vanliga t.d. 40 tímar um vikuna, og hann í barsilstíðini framhaldandi arbeiðir 10 tímar, skriva tá, at løntakarin arbeiðir 25% av fullari tíð. Inntøkugrundarlagið verður lækkað eftir hesum.

Foreldur, ið eru nýútbúgvin kunnu frá 1. juli fáa barsilspening, har studningur telur við í útrokningargrundar-lagnum. Hetta er galdandi fyri tey, sum eru liðug við útbúgvingina og byrja barsilsfarloyvi 1. juli og framyvir.

### 4. Váttan frá arbeiðsgevara

Arbeiðsgevarin váttar, at teigarnar 2 og 3 eru sannir. Um eingin arbeiðsgevari er at vátta, skal frágreiðing ásetast í teigi 6. Í hesum sambandi er Arbeiðsloysisskipanin at rokna sum arbeiðsgevari.

### 5. Váttan frá mammuni

Her skal mamman vátta, at umsøkjarin er pápi ella sammóðir at barninum. Mamman skal eisini vátta, um pápin ella sammóðirin søkja um barsilspening fyri meira enn 4 vikur.

### 6. Viðmerkingar

Viðmerkingar kunnu t.d. vera, at nevndararbeiði verður gjørt í barsilstíðini, at eingin arbeiðsgevari er o.s.fr.

### 7. Váttan frá umsøkjara

Her skal umsøkjarin vátta, at givnu upplýsingarnar eru rættar, og at hann fer at boða frá broytingum, sum kunnu ávirka barsilsfarloyvið. Somuleiðis váttar løntakarin, at hann er um barnið í barsilstíðini.

Umsóknin skal útfyllast nágreiniliga. Vanta upplýsingar ella neyðug skjalprógv, ger Barsilsskipanin vart við hetta. Tá skulu upplýsingarnar útvegast Barsilsskipanini innan 14 dagar, annars fellur umsóknin burtur.

Verða skeivar ella misvísandi upplýsingar givnar, verða goldnar upphæddir afturkravdar. Gev eisini gætur, at sambært § 162 í revsilógini kann eisini verða ásett sekt ella fongsul í upp til 4 mánaðir. Upplýsingar í umsóknini kunnu í sambandi við eftirlit verða eftirkannaðar við heimild í § 21 í barsilslógini.

Gjølligari kunning um barsilsfarloyvið er at finna á heimasíðuni hjá Barsilsskipanini, www.barsil.fo.

---

**Send skjalið til barsil@taks.fo ella til TAKS, Postboks 2151, 110 Tórshavn**

Gev gætur, at skjalið inniheldur persónsupplýsingar til TAKS at viðgera. Kunna teg um viðgerð av persónsupplýsingum og um rættindi tíni í hesum sambandi á www.taks.fo/persónsupplýsingar.